VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

# Húsavørður til Vinnuháskúlan.

Vit sóknast eftir húsavørði við góðum handalagi at taka sær av øllum vanligum húsavarðaruppgávum í bygningum skúlans. Starvið er hálva tíð.

**Tínar uppgávur verða hesar:**
- alt vanligt viðlíkahald,
- smáar umvælingar,
- gera hølir klár til próvtøkur o.a.,
- umframt aðrar uppgávur, álagdar av leiðsluni.

**Vit ynskja ein starvsfelaga sum:**
- er arbeiðssamur,
- setur eina æru í at alt er í ordan,
- dugir væl at samstarva,
- er fleksibul,
- arbeiðir sjálvstøðugt,
- er tænastusinnaður.

Tað er eitt ynski, men ikki ein treyt, at tú ert handverkari og hevur starvast sum handverkari.

Starvið verður sett skjótast til ber, og verður lønt sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Eru spurningar til starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Wilhelm E. Petersen, stjóra, á teldupostadressu wilhelm@vh.fo ella á telefon 233250.

Umsóknir saman við viðkomandi prógvum og lívsrensli skulu sendast til: starv@vh.fo
Viðmerk “Húsavørður til Vinnuháskúlan” í yvirskriftina. Freistin at søkja starvið er mánadagin 16. mai 2019.

***Um Vinnuháskúlan***
*Vinnuháskúlin bjóðar góðar og breiðar útbúgvingar við bestu leiðsluførleikum, ið kunnu brúkast bæði á sjógvi og landi. Vinnuháskúlin fevnir um sjómansskúla, maskinmeistaraskúla, brandskúla og skeiðsdeild. Føroyingar hava altíð verið eitt siglandi fólk, og tí eru maritimu útbúgvingarnar eisini millum elstu útbúgvingar í Føroyum. Á skúlanum starvast uml. 50 starvsfólk.*